# n tónleik – AME í Reykjavík



Gestir við á seinasta AME tiltakinum í Reykjavík. Tá var Høgni mettur av íslendingum, at vera eitt áhugavert navn. Tónleikurin hjá honum var um tað mundið, dúgliga spældur í íslendskum útvarpi og kom eisini út á savnsfløguni 100% Sumar.

Brandur Enni, sum ikki hevur verið nógv at hoyrt í seinastuni, hevur fyrr spælt í Íslandi, og var tað spennandi hjá honum nú at vitja aftur við nýggjum tónleiki, sum hann í stóran mun sjálvur hevur skrivað.

### Teitur fyrstu ferð í Íslandi

Teitur, sum er at rokna, sum okkara stórsta altjóða tónleikanavn, hevur ikki verið at hoyrt á palli í Íslandi áðrenn hetta vikuskiftið. Tað mesta av heiminum hevur verið hansara pallur, og kanska serliga nógv hevur hann ferðast eftir amerikonsku landavegunum. Nú høvdu íslendingar møguleika at hoyra dugnaliga føroyska sangaran og sangskrivaran.

Stóra føroyska navnið í Íslandi er Eivør Pálsdóttur, sum hevur miklan tokka millum íslendingar. Hetta er kanska heldur ikki so løgið, um hugsað verður um, at hon hevur verið búsitandi í Íslandi, og at tónleikur hennara verður givin út á íslendska plátufelagnum 12 Tónar.

Gestir hava eisini fyrr luttikið á AME í Reykjavík, og var hetta eitt frálíkt høvið hjá bólkinum at vitja aftur. Gestir, sum ikki hava spælt alment síðani undan jólum, hava nú fingið umboðssáttmála, og væntandi fer at verða styttri millum framførðslurnar, sum árið fer at líða.

### Konsertin varð fest á band

Eini 500 fólk høvdu leitað sær í NASA leygarkvøldið. Talan var um fólk í øllum aldri, tey flestu vóru íslendingar, men eisini nakrir føroyingar búsitandi í íslandi, vóru at síggja millum áhoyrarnar. Fleiri fólk innan tónleikavinnuna, bæði úr Íslandi og eisini úr Onglandi, luttóku eisini til tiltakið, og júst hesi eru sera umráðandi at hava við, um komast skal nakra leið víðari. Nýggjur føroyskur tónleikur hevur fingið alt meira rúmd í íslendskum útvarpi, síðani skipað varð fyri fyrsta AME tiltakinum í Reykjavík. Íslendska útvarpsrásin, RÁS 2, festi konsertina á band, og ætlandi verður hon send einaferð seinni í ár. Eivør og Teitur vitjaðu eisini í íslendskum útvarpi undir vitjanini. Tosað varð við tey, umframt at tey framførdu tónleik, bæði hvør sær og saman.

### Eitt frálíkt tiltak

Fyrsta navnið á pallinum var Brandur Enni. Klokkan var farin nakað av tíggju, tá fyrstu tónarnir ljómaðu úr guitarinum hjá Brandi, og klokkan var farin av tvey, áðrenn seinasti tónin úr klaverinum hjá Knúti úr Gestir, spakuliga fánaði út í køldu íslendsku náttina.

Sum heild vóru fyrireikararnir væl nøgdir við tiltakið. Tað gekk væl at fáa allar bólkarnar á og av pallinum, og tíðarætlanin helt rættiliga væl. Sólva Ford hevði leiklutin sum frásøgufólk. Hon royndi seg bæði á føroyskum og íslendskum, og hetta kom hon væl frá. Ljóðið í salinum var gott, men kanska var salurin betur egnaður til tann friðarliga tónleikin, heldur enn orkuútlátini hjá bæði Høgna Lisberg og Gestir. Fleiri av tónleikarunum vóru ikki heilt nøgdir við ljóðroyndirnar, men hetta var ikki nakað, ið flestu áhoyrarnir hugsaðu um, men onkur framførðsla var smávegis nervað av hesum. Alt í alt eitt frálíkt tiltak.

# Forkunnugir føroyskir tónar frá Teiti

**Millum løgini hjá Teiti vóru fleiri nýggj løg av komandi føroysku útgávuni Káta Hornið.**

*Fróði Løksagarð*

Teitur er uttan iva føroyski tónleikarin, sum er komin longst í altjóða høpi. Hann hevði altjóða plátusáttmála við Universal, og hevur nú stovnað egið plátufelag, umframt at hann hevur spælt í nógvum londum. Serliga drúgvur hevur hann verið í Amerika. Teitur, sum dagliga býr í London, er eisini eitt navn íslendingar kennast við og hetta varð eisini prógvað á NASA leygarvøldið

Frammanundan konsertini leygarkvøldið hevði Teitur, umframt at spælt í bæði í íslendskum sjónvarpi og útvarpi, eisini havt eina minni konsert í Íslandi, so tað vóru uttan iva fleiri av áhoyrarunum, sum vóru møttir av hansara ávum, eftir áhaldandi smakkiroyndir dagarnar framman undan.

### Íslendskir strúkarar

Teitur hevði ikki fasta bólkin hjá sær við. Ístaðin hevði hann fingið eina íslendska strúkarakvartett, tríggjar violinir og eina cello, at hjálpa sær. Teitur byrjaði konsertina einsamallur við klaverið. Hetta riggaði avbera væl, og vísti eisini, hvussu royndur sangari og sangskrivari Teitur við tíðini er vorðin. Hann hevur avgjørt ein altjóða dám, sum ikki kann tilognast uttan drúgvar royndir á palli. Fyrri parturin av konsertini var merktur av tilfari frá teimum báðum ensku útgávunum hjá Teiti, og tað vóru løg sum Louis, Louis og Josephine, sum fingu bestu móttøkuna frá íslendsku áhoyrarunum. Great Balls Of Fire var eisini væleydnaður saman við strúkarunum.

### Teitur á føroyskum

Sæð við føroyskum eygum, so vóru tey trý løgini av komandi føroysku útgávuni "Káta Hornið" tey mest forvitnisligu. Talan er um eina sonevnda konseptútgávu, har sangirnir samanlagt siga eina søgu. Sambært Teiti, er søgan um ein ungan mann, sum flytur heimaftur til Føroyar, eftir at hava búð uttanlands. Teitur spældi trý løg av nýggju útgávuni. Heitislagið, Káta hornið og løgini Tokspor og Tú ert ein eingil. Nýggju løgini vóru góð, uttan tó at vera líka fangandi, sum nøkur av ensku løgunum hjá honum. Neyðugt er hjá lurtarunum at venja seg við at hoyra Teit á føroyskum aftur.

Framførðslan hjá Teiti var væl eydnað. Kanska átti hann at spælt fleiri av eldri løgunum, men tá Káta Hornið, eisini verður givin út í Íslandi, so var hetta ein gyltur møguleiki, at læta íslendingar hoyra nøkur av nýggju løgunum.

# Kafékvøld í Ørkini

*mynd: Hergeir Eldevig*



Seinastu luttakararnir til AME tiltakið í Reykjavík, lendu um seks tíðina í fríggjakvøldið. Longu fáar tímar seinni ljómaðu fyrstu føroysku tónarnir í Reykjavík.

Sjómansheimið Ørkin saman við føroyingafelagnum skipaðu fyri kafe kvøldi við livandi tónleiki. Fitt av fólki var komið saman at líða á føroyska tónleikin, sum bleiv framførdur av Brandi Enni, Sólvu Ford og limun úr Gestir. Eisini spældu bæði Høgni Lisberg og Teitur smærri konsertir í býnum.

*Mynd: ame.fo*